sósindabløðið
sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Jóstinus L. Eidesgaard - Eyðun Klakkstein - Elrikur Lindenskov - Áki Bertholdsen

Útgevari, uppseting og prent: P/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26 Argjum

Postadr. Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Internet: http://WWW.cybernet.dk/faroe-news e-mail: sosialur@olivant.fo

Tónleikur og fjølmiðlar

Oddagrein

EITT tað størsta tónleikatiltakið nakrantíð í Føroyum var stóra musikskúlaorkesturstevnan seinasta vikuskiftið. Ikki færri 500 ungdómar úr Norðurlondum vitjaðu í Føroyum, vóru saman við føroyskum tónleikarum og hildu konsertir úti um landið. Endin á tiltakinum var stór gallakonsert í Norðurlandahúsinum.

NÚ um dagarnar hevði ein musikskúlalærari viðmerking her í blaðnum til ummæli í 2´aranum herfyri. Musiklærarin var misnøgdur við skrivingina í umrødda ummæli, har eitt av blaðfólkunum her á blaðnum fegnaðist um, at tann klassiski tónleikurin í útvarpinum hevði færri lurtarar enn aðrar sendingar. Musiklærarin spurdi í síni viðmerking, um hetta var blaðsins støða eisini til hetta slagið av tónleiki.

LAT okkum gera greitt, at tað, sum stendur í umrøddu ummælum er ikki blaðsins meining. Tað stendur fyri blaðmansins egnu rokning. Annars halda vit, at tað er gott, at musikskúlalærari nemur við henda spurning: hvør hugburðurin er hjá ikki bert Sosialinum men hjá pressuni í heila takið til tónleikalívið her á landi. Vit halda, at tað er uppá tíðina at fáa eitt orðaskifti um júst hetta málið, tí tónleikurin er so ómetaliga týdningarmikil fyri okkum øll. Tað er harðliga tiltrongt við einum breiðum og sakligum tjaki um henda spurning, og kanska er tað eisini rætt at taka tað upp beint nú - í kjalarvørrinum á einum ti størsta tónleikatiltakinum her heima.

RÆTT er fyrst at spyrja, hvør politikkurin í dag er á tónleikaøkinum! Hvussu stórur partur av mentanarliga lívinum her á landi útger júst tónleikurin! Hvussu mong eru virkin í tónleiki! Hvussu nógv letur tað almenna til tónleikalívið! Hetta eru eftir okkara tykki rættiliga týðandi spurningar at seta og svara skulu vit seta hol á eitt orðaskifti sum longu nevnt.

FJØLMIÐLARNIR fáa oftani skyldina fyri bæði bæði líkt sum ólíkt. Teir eru so sanniliga ikki lítaleysir. Tað er eisini spurningurin, hvussu nógv fjølmiðlarnir megna at dekka í einum samfelag sum tí føroyska - hvussu langt orku og pengar røkka, og tá vil tað eisini vera ein spurningur um prioritering. Og tað eru helst tey, sum ikki orka fyri ítrótti ella politikki, sum siga, at tónleikurin verður alt ov lítið prioriteraður. Her á blaðnum royna vit at "dekka" tónleikalívið tvs. siga frá tónleikatiltøkum ol. Vit leita eisini javnan eftir fólki at ummæla tónleik, men tað er ómetaliga torført. Kanska alt hetta kundi verið gjørt á annan hátt. Vit eru tilreiðar at viðgera hetta málið og gera okkara til, at tónleikurin fær betri innivist í føroysku pressuni. Men fyri at hetta skal bera til mugu eisini tónleikalærarar vísa ein góðan vilja.

Sosialurin

Vatnsnesvatn – og Hovsdalur sum ídnaðarøki?

Komið var fram, at Landsstýrið skuldi taka støðu til, um Vatnsnesvatn skuldi nýtast til smoltaling í onnur 18 ár, og um viðgerast skuldi við rotanon tá fiskasjúkan BKD varð staðfest í 1994.

Loyvi til rotanonviðgerð var útgingið, og av landsstýrinum longt 17. í hesum at galda til 1. juli í ár. Hetta mál sigast at vera sera løgið, partvís tí landsstýrið veit at sera ivasamt er um Heilsufrøðiliga Starvsstovan fer at geva umhvørvisgóðkenning sambært Umhvørvisverndarlógini kap. 5, um sera dálkandi virkir v.m., og partvís tí landsstýrið veit at Vatnsnesvatn er sera illa dálkað av fóðurleivdum frá alifiski, tungmetallum og leivdum frá heilivágsviðgerð. Hetta sambært sera áhugaverdari og skelkandi tulking, ið H.S. hevur gjørt av kanningum um umhvørvislig óynskt árin frá alivirkseminum á Vatnsnesvatni frá 1983 til 1994.

Skelkandi dálking

Tulkingarnar hjá H.S. frá 10. mai í ár, eru óhugnaligur lestur um hvussu eitt náttúru -fjallavatn og umhvørvi í mest friðsælu náttúru okkara, langt burtur frá búseting, í kleyvarskapi og tápuligheit er vorðið neyðtikið og ovurhonds dálkað av køvandi gassum frá fóðurleivdum, tungmetallum frá vasking og impregnering av nótunum, og leivdum frá viðgerð av antibiotika.

Vatnsnesvatn

Vatnsnesvatn er eitt av smáu fjallavøtnum okkara. Vatnið liggur góðar 180 metrar oman fyri havyvirflatu og er bert 10 metrar djúpt. Útskiftingin á vatninum er ikki stór, millum 4–5 ferðir pr. ár. Vatnsnesvatn tók, áðrenn byrgingin bleiv bygd, 200.000 rúmmetrar.

Kanningar av føroyskum vøtnum frá fyrst í øldini vísa, at eitt sera fjølbroytt smádýraliv var at finna. Nevnd eru gott 17 ymisk krebsdýr, iglur o.a.

Vøtn sum brunnar til vatnorku

Í 1921 bleiv byrging sett upp til fyrsta El-verkið í landinum. Tunnil bleiv gjørdur gjøgnum fjallið til verkið Í Botni. Tá vøtn sum Eiðisvatn og Vatnsnesvatn verða brúkt til vatnorku, hevur hetta óheppin árin á plantu- og djóralív. Skiftandi vatnstøðan vaskar burtur økið millum hægstu og lægstu vatnstøðu og ólag kemur í botnfaunaina og talið av botndjórum minkar.

Afturat hesum kemur óbótaligi missurin í reina umhvørvinum og óspiltu náttúruni, ið annars kundi verið nýtt til rekreatión- og frítíðarmøguleikar hjá okkum sjálvum og ferðafólki.

Vøtn sum brunnar til aling

Fóðurspilla og ekskrementir frá alifiskinum hava sjálvsagt stórt árin á plantu- og djóralív. Talið á nøkrum djórum minkar, meðan onnur hvørva heilt. Oksygentrot á botninum, frá niðurbrótingini av lívrunna evninum, hevur við sær, at framleidd verða eitrandi gassir, metangass og hydrogensulfid. Gassini koma í vatnið og hava við sær at alifiskurin mistrívist, veksur seinni og verður lættari sjúkur.

Størsta hóttanin móti lívinum í vatninum er nýtslan av antibiotika og kemiskum evnum. Millum 60 og 98% av tí antibiotika, ið brúkt verður í viðgerð, verður upptikið av botnløgunum og djórum kring alinótina. Árinið á botnin verður at hann gerst sterilur og hevur torførari við at niðurbróta lívrunnin evni. Nøkur evni niðurbrótast ikki, m.a. oksytetracyklin og oksolinsýra.

Restevnini finnast aftur í botnløgunum, vatninum og fóðurpartiklum, ið verða etnir av sniglum, fiski o.ø.

Ongin vissa er fyri, at alifiskurin ikki inniheldur restir av heilivági. Størsti vandin er at sjúkuelvandi bakteriur gerast mótstøðuførar ella resistentar. Nýggj og sterkari sløg av antibiotika skulu finnast, og eru vit tá inni á sera vandamiklari kós. Hesin álvarsami trupulleiki gevur í dag alheims serfrøðingum stórt høvuðbrýggj. Funnar eru kjøtetandi, resistentar bakteriur, ið gera av við fólk uppá fáar dagar.

Onnur óynskt árin stava frá nýtsluni av formalin og malakittgrønt til viðgerð av smolti móti svampum. Kanningar visa, at formalin er krabbaelvandi, meðan malakittgrønt inniheldur stórar nøgdir av kopari.

Fyri at mótvirka gróðuri á nótunum eru tær viðgjørdar við tinn, ið verður roknað sum sera eitrandi.

Rotanonviðgerð

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sigur í frágreiðing síni, at rotanonviðgerð eigur bert at verða brúkt sum ein seinasta loysn um trupulleikar á alibrúkum ikki kunnu basast á annan hátt.

Rotanon er eitrandi bæði fyri dýr og plantur og ganga millum 3 til 5 ár, til vatnið er »grøtt« aftur.

Rotanon er vunnið burtur úr rótunum á triopiskum ertraplantum. Fyri betur at upploysast í vatninum, verða kemisk evni sett til.

Allir løkir, sum renna í smáu vøtnini og tjarnirnar í Porkeris- og Hovshaga, og áir, ið renna til Bessavatn og Vatnsnesvatn, skulu eitrast fyri at røkka málinum, ið sigst vera at útrudda fiskasjúkuna BKD.

Endamálið er síðan at halda á fram við smoltaling.

Spyrjast kann, hví tað er so átrokandi at ala smolt á Vatnsnesvatni? Hvat gera grannalond okkara og hvørjar tilráðingar eru frá heilsu- og umhvørvisráðleggingarstovnum. Staðfest er at Vatnsnesvatn er sera álvarsliga dálkað av tungmetallum og eiturgassum frá lívrunna tilfarinum á botninum. Fjølbroytni í djórasløgunum hevur verið í stórari afturgongd og uppruna símu eru burtur. Stór andsøgn er at vit hava fingið nýggja, framkomna livfiskastøð til aling av fiski í kørum undir strongum og skipaðum eftirliti. Hetta kostnaðarmikla smolt verður síðan latið út í lív- og evnafrøðiligu suppuna í Hovsdali.

Enntá skal smoltstudningur latas – til aling á illa dálkaðum vatni. Hvør er keyparin til slíka framleiðslu og hvussu verður umdømið á føroyska alifiskinum? Eru smolt- og fiskaalarar kring landið áhugaðir í at fáa slíka framleiðslu út á marknaðin?

Aling á vøtnum bannað

Danmark og Noreg loyva ikki aling á vøtnum vegna heilsu- og umhvørvisliga dálkandi árin, ið standast av slíkum virksemi. Rotanon verður ikki brúkt í Noregi til viðgerð móti BKD og furunkulosu. Harafturímóti brúka teir tað til viðgerð móti parasitti, ið ger av við alifiskin.

Alheims heilsustovnurin WHO hevur nýliga sent út kunngerð, har ávarað verður móti óneyðugari nýtslu av antibiotika.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sigur í kanning síni, at tað er ógvuliga umráðandi, at fleiri kanningar verða gjørdar á Vatnsnesvatni fyri at staðfesta árin av alivirkseminum.

Rotanon er ikki brúkt áður í vøtnum okkara. Bygdaráðið í Vestmanna setti forboð í sínari tíð, tá talan var um at viðgera vøtnini í Vestmanna.

Aling á Vatnsnesvatni vil ongantíð kunna brúkast til nakað skilagott, og vil vera deyðadømt uppá forhond. Sjúka vil skjótt taka seg upp aftur, og so er akkurát líka vítt.

Umhvørvisgóðkenning skal gevast av H.S. Hvussu slík kann gevast er ikki skiljandi við teimum úrslitum kanningarnar vísa.

Frágreiðingin hjá H.S. er dagfest 10. mai í ár. 7 dagar seinni undirskrivaði landsstýrið góðkenning at viðgera við rotanon. Sagt verður, at einki nýtt er komið fram um støðuna í Vatnsnesvatni. Spyrjast kann hvat landsstýrið vil við H.S. síðan tilráðingar og gjølliga lýsta dálkingarstøðan á Vatnsnesvatni verður skúgvað til viks uttan himpr. Vatnsnesvatn er óbrúkiligt til aling og tað veit

Framhald á síðu 5

Vikarur

Søkt verður eftir vikari til Vágs skúla komandi skúlár. 14 tímar um vikuna

Vágs skúlanevnd
v/ Jonhild Kjærbo, Vágur

Bingotølini í dag:

38 81